**Norðurlendsk ráðstevna um etikk 19. og 20. oktobur 2012**

Á hvørjum ári hittast Sjúkrarøktaretisku ráðini til fundar, har etikkur verður viðgjørdur út frá nógvum ymiskum sjónarhornum.

Ráðstevnurnar eru eitt afturvendandi árligt tiltak og ganga fyri seg til skiftis í teimum ymisku londunum og fyrsta ráðstevnan varð hildin í Danmark 2005

Í ár var etiska ráðið í Føroyum vertur við hesa ráðstevnu, sum var hildin í hølunum hjá Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum. Luttakarar uttanífrá vóru úr Svøríki, Noregi, Danmark og Grønlandi. Vónað og væntað var, at Ísland eisini kundi verða umboðað, men tey hava júst fyri stuttum endurstovnað teirra sjúkrarøktaretiska ráð og hava ikki byrjað teirra arbeiði enn, tí vænta tey at taka lut næsta ár.

Vertslandið velur skránna fyri dagarnar og føroyska etiska ráðið hevði valt at seta áleikandi evni á skránna.

1. Lýsing av vón hjá kvinnum, sum júst hava fingið staðfest krabbamein við Kristionnu Hammer sjúkrarøktarfrøðingi og Ph.d
2. Framløga av fyribils arbeiðinum við at kanna hvussu sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum brúka yrkisetisku leiðreglurnar við Annemi Joensen, Katrin Andersen og Hildur við Høgadalsá, allar sjúkrarøktarfrøðingar og ávikavist stjónsmálafrøðingur og master í yrkismenning
3. Retorikkur um eldri  í etiskum perspektivi við Ásu Róin sjúkrarøktarfrøðingi og stud. Ph.d

Ad 1.

Granskingin hjá Kristionnu Hammer leggur dent á at varðveita vónina hjá kvinnum, sum júst hava fingið staðfest krabbamein. Kristianna hevur eisini brúkt nýggjan hátt at samskifta við informantarnar. Hon hevur latið kvinnurnar tekna, sum grundarlag undir samrøðuna. At tekna og at brúka tekningina sum samskiftisamboð er ikki nýtt innan sjúkrarøkt, men tað er nýggjur háttur innan gransking. Kristianna hevur skrivað 3 greinar um sína gransking og tær eru allar útgivnar í vísindaligum tíðarritum, tann seinasta um tekning innan gransking í Cancer Nursing.

Hendan greinin er skrivað saman við prof.emer. Elisabeth Hall frá Aarhus Universiteti og prof. Ole Mogensen frá Syddansk Universiti. Greinin er tann triðja hjá Kristionnu Hammer, sum verður givin út í altjóða tíðarriti.

Greinin lýsir kanningina, sum snýr seg um sambandið millum vón og krabbamein. Kannað verður við samrøðum og tekningum, hvussu kvinnur, sum júst hava fingið staðfest krabbamein greiða frá vón. Hvussu ein persónur megnar hetta tíðarskeiðið, kann hava ávirkan á hvussu hann kemur ígjøgnum tíðina sum sjúklingur og her er vónin ein viðspælari. Franski filosoffurin Gabriel Marcel sigur um vón at:

*Hope is for the soul what breathing is for the living organism. Where hope is lacking, the soul dries up and withers. It is no more than a function. .....(Marcel 1951).*

Atknýtt leinkja
**Les greinina her**

Eftir framløguna var bólkaarbeiði, har luttakararnir royndu at brúka tekning sum grundarlag undir samskifti.

Ad 2.

Nú er granskingin viðvíkjandi brúk av yrkisetisku leiðreglunum komin so langt, at fokusbólkasamrøðurnar eru lidnar og data eru transskriberaði. Sostatt var gjørligt at leggja fyrstu úrslitini av kanningini fram. Niðurstøðan er í heilt stuttum tann, at sjúkrarøktarfrøðingar brúka ikki leiðreglurnar beinleiðis,men leggja stóran dent á at arbeiða etiskt. Arbeitt verður víðari við at greina og viðgera data og at skriva rapport. Ætlanin er at leggja endaliga úrslitið fram til várs.

Eftir framløguna var bólkarbeiði við grundarlagi í spurningum har luttakarnir diskuteraðu um brúk er fyri skrivligum yrkisetiskum leiðreglum og hvussu tey sóu møguleikan at integrera leiðreglurnar í dagliga arbeiðið. Harafturat var spurt, um etisku leiðreglurnar kunnu brúkast sum argumentasjónsamboð í mun til ymiskar praktiskar støður – sjúkrarøktarfakliga góðsku, sparingar ella røktartyngd. Og hvørjar royndir luttakararnir hava við at brúka etisku leiðreglurnar sum refleksjónsamboð.

Ad 3.

WHO hevur skýrt 2012 til at vera eldraár. Etiska ráðið vildi peika á hetta umráðandi evnið og halda, at alt ov lítið ella at kalla einki fokus hevur verið sett á evnið og einki orðaskifti er um nevndu viðurskifti hvørki fakliga ella almennt. Etiska ráðið tekur eisini frástøðu frá negativu umrøðuni um eldri og elli. Dømini um hetta eru nógv innan miðlaheimin, har hugsað verður um umrøðuna sum t.d. “eldrabyrðan”. Harafturat eru framhaldandi skerjingar innan umsorgan og hjálp til eldri borgarar. Eingin veit hvussu henda umrøðan ávirkar tey eldru. Ása kannar hvussu eldri verða ávirkað og legði fyribils arbeiðið við hesum fram.

Mentanarligi parturin var lýstur við at bjóða luttakarunum rundferð í gomlu Havnini við ferðaleiðara og vitjan í Tilhaldinum, har leiðarin tók ímóti og greiddi frá arbeiðinum. Tórshavnar Býráð var vertur við døgurða um kvøldið og vit takka hjartaliga fyri stuðulin.

Komandi norðurlendsk ráðstevna innan etikk verður í Svøríki 26. og 27. sept. 2013